# Boney M til Føroya

**Tiltikni disco-bólkurin við teimum mongu hittunum spælir í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 14. september**



TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Fyri stuttum góvu tey út eina savnsfløgu við teimum best umtóktu sangunum hjá sær. Hesir sangir rúmast ikki á einari fløgu, so savnsfløgan var mátti verða ein tvífløga við sangum sum »Rivers of Babylon«, »Rasputin«, »Daddy Cool«, »Ma Baker« og øðrum.

Talan er um disco-bólkin Boney M, sum hevði eitt hitt fyri og annað eftir fyri 20 árum síðani og meira.

Sangirnir hjá Boney M hava verið sera nógv spældir í Føroyum, og sum flest allir føroyingar kenna.

Nú kemur bólkurin til Føroya at spæla, og leygarkvøldið 14. september ber til at hoyra øll hittini hjá teimum á konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

**Eisini føroyskt hitt**

Í fjør kundi Boney M halda 25 ára jubileum, og gjøgnum hesi árini er manningin í bólkinum broytt eitt sindur. Men ein av songkvinnunum hevur verið við øll árini. Tað er Maizie Williams, og hon verður sjálvsagt eisini við á Føroyaferðini.

Umframt Boney M fer eisini Terji Rasmussen at hita upp við sínum bólki, og plátuvendarin Ottar í Funningsstovu fer at leggja tónleik á.

Talan verður um eitt kvøld við eini rúgvu av hittum.

Forsøla av atgongumerkjum verður á Statoil-støðunum í Klaksvík, Runavík, Kollafirði og Havn, og atgongumerkini kosta 225 krónur.

Bussamband verður úr Havn, av Strondum og av Toftum, og Alpha Pilot fer at sigla úr Klaksvík í sambandi við konsertina.

# Sunnudagsskúlin landsfund

**Leygardagin 31. august hevur Sunnudagsskúlin hjá Heimamissiónini árliga landsfundin í Nesvík. Sum nakað nýtt ber til at velja áhugatímar á landsfundinum**

SUNNUDAGSSKÚLI
*Tíðindaskriv*

Landsfundurin er dagurin, har sunnudagsskúlalærarar úr øllum landinum hava høvi at lurta eftir Guds Orði, møta øðrum sunnudagsskúlalærarum, tosa saman, og fáa og geva hvør øðrum íblástur í sunnudagsskúlaarbeiðinum.

Evnið á landsfundinum í ár er »Sunnudagsskúlin – ein barlast fyri lívið«.

Frits Thomsen av Skála fer at hava ein tíma um boðanina í sunnudagsskúlanum. Her verður millum annað nomið við týdningin av boðanini, hvussu vit fyrireika okkum, og hvussu vit kunnu gera boðanina viðkomandi fyri børnunum.

Sum nakað nýtt í ár, verða seks áhugatímar at velja millum. Teir eru um ymiskt, sum hevur við sunnudagsskúlan at gera.

Áhugatímarnir hava fingið heitið:

1. Sangir og sangval í sunnudagsskúlanum.
2. Hvussu brúka flonellugraf.
3. At læra bíbliuorð.
4. Hvussu »takla« ófriðarlig børn í sunnudagsskúlanum.
5. Leikir í sunnudagsskúlanum.
6. Dukkur.

Hvør sunnudagsskúlalærari hevur høvið at luttaka í tveimum áhugatímum. Á landsfundinum verður ein stutt kunning um hvønn einstakan tíma, og síðan ber til at velja áhugatímar.

Landsfundurin byrjar klokkan 9.30 og endar klokkan 15.30. Av tí at dagurin serliga er ætlaður sunnudagsskúlalærarum, verður eingin barnaansing. Tað er neyðugt at tekna seg til landsfundin.

# »Glas, gummi, gull og (genbrug) endurnýtsla«

**Framsýning við fýra donskum listahandverkarum letur upp, leygardagin 31. august kl. 14.00 í Norðurlandahúsinum í Føroyum**



*Bettina Shori*



*Lisbeth Nordskov*



*Anne Louise Bang*

TÍÐINDASKRIV
*Norðurlandahúsið*

Á framsýningini luttaka: glassniðurin – Bettina Shori, gullsmiðjurin – Lisbeth Nordskov, sniðgevin – Lone Villaume og klædnasniðgevin – Anne Louise Bang, allar eru limur í felagnum hjá Donskum Listahandverkarum.

Framsýningin tekur støðið í valinum av tilfari. Tær siga, »at tilfarið er fyri okkum allar við til at seta traditiónirnar uppá spæl. Tær arbeiða allar við einum ella fleiri blandingum av evnunum: Glas, gull, gummi ella endurnýtsla. Antin sum tað einasta tilfari ella ein blanding av fleiri. Tær gera snið, eftir gomlum sniði, uppá ein óvanligan hátt. Hetta merkir m.a. ein øðrvísi háttur at nýta tilfari uppá, tvs. ein óvanlig samanseting. Hetta fær ofta smílið fram hjá hyggjarinum og gevur honum nýggjar avbjóðingar í mun til upplivingina av listaverkinum.

Tær fýra eru allar formgevarar við hvør sínari bakgrund. Dagliga arbeiða tær hvør í sínum lag við handlum, framsýningum, undirvísing og aðrari prýðing. Henda felags framsýning er ein úrdráttur av teirra dagliga arbeiði. Tær siga, at verkini eru gjørd til hesa framsýning og at tær vilja vísa á arbeiði við hesum tilfarið.

Lisbeth Nordskov gere m.a. smúkkur úr súkkulslangum og neilon blandað við dýrum metallum. Lone Villaume nýtur eisini súkkulslangur,hon ger l ymisk brúkslutir, so sum taskur og pungar og biløt. Bettina Shori arbeiðir við brúkslutum úr glasi, blandað við jarni og kobar og stuttlig lutum brúkthandlarinum. Anne Louise Bang nýtir m.a. pakkibond til síni vovnu gullteppir og rúmdeilarar.

Teirra felags støðið er tilfar úr dagligdegnum sum ofta er rusk ella pakkitilfar. Tilfar sum vit vanliga meta sum uppbrúkt. Tær geva sostatt tilfarinum eina nýggja funksjón. Tilfari fær eina listfrøðisliga funktión, ið ikki var uppruna ætlanin hjá framleiðarinum. Tað brúkta tilfari hevur ofta eina vakra yvirflatu, litir og bygna og ein listfrøðisligan vakran framburð, ið ofta verður mentur og gjørdur nýtiligur við at flætta tað saman við nýggjum tilfari og gera tað aftur til eina nýggja brúksvøru.

Tær siga seg geva áskoðarinum innlit í teirra verð og dagligdag, við øðrum eygum enn teimum vanligu, og sjálvar vilja tær fýra eisini kanna tey støð, sum hesi ting skulu sýnast fram í.

Framsýningin er opin til og við sunnudagin 28. september, síðan verður hon at síggja í Mariehamn í Álandi og Nuuk í Grønlandi.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara kæra mamma, vermóðir, omma og langomma

**Thurid Frederiksberg**
fødd Thomasen, ættað úr Miðvági

búsitandi á Strondum,
andaðist á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík
mánadagin 26. august, 86 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Fyri tey avvarðandi*

**Børnini**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Esbjørn Øster**

føddur á Tvøroyri, búsitandi í Keypmannahavn,
andaðist hósdagin 22. august, 90 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Skt. Thomas Kirke,
L. I. Brandes Allé 4, 1956 Frederiksberg
hósdagin 29. august kl. 11.00.

*Familjunnar vegna*

**Iris, Peter og Tom**



# Pennavinir hittast

VITJAN
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Her eru báðir flokkarnir avmyndaðir uttanfyri Hoyvíkarskúla leygardagin, tá høllin varð tikin í nýtslu.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Seinastu vikuna hevur ein sjeyndi flokkur úr Søllinge Skole á Fjón verið í Føroyum og vitjað sjeynda flokk í Hoyvíkar Skúla. Børnini, 23 í tali, komu til Føroyar seinasta mikudag við Maersk flogfarinum. Frøin var stór, tá børnini hittust, og tað er ikki so løgið, tí tey kennast. Fyri tað fyrsta, so hava tey skrivað saman seinastu trý árini, tey eru pennavinir og so hevur eisini sjeyndi flokkur úr Hoyvík verið í Danmark í summar og vitjað donsku børnini. Tað vóru vinfólk íð hittust.

Í gjár, tá hesar reglur vórðu skrivaðar, var týsdagur og børnini í hesum báðum sjeyndu flokkum vóru troytt. Seinastu dagarnir høvdu verið strævnir og spennandi. Og teir høvdu verið proppaðir við tiltøkum frá sólarrisi til sólsetur. Tey høvdu slett ikki havt stundir til at keða seg og minni enn so.

Og í gjár vóru tey heldur ikki liðug. Tey skuldu eftirmeta og taka saman um. Hetta skuldu tey nýta hálvan annan tíma til. Síðan varð farið á Fornminnissavnið í Hoyvík, sum er beint í grannalagnum og aftaná fór at rúka av reyðupylsu, tí skyldubundna makrelsalatinum og havnaspiki, tað er sjokolátuviðskeri. Tá varð matpakkin etin.

Seinnapartin vóru pennavinirnir at síggja í Havnargøtum og tey skulu eisini vitjað Náttúrugripasavnið. Um kvøldið søgdu tey hvørjum øðrum farvæl. Tá hittust næmingar, foreldur og lærarar aftur á skúlanum, og borðreitt varð við føroyskum viðskera.

Børnini hava gist hjá pennavinunum í Føroyum og hvørt kvøld, aftan á lokna skrá, eru tey komin heim, og tey hava verið víða kring landið. Tey løgdu í vaðið beinanvegin mikudagin og hildu leiðina til Sands. Har gistu tey í Ungmannafelagshúsunum, og gjørdu eisini eina útferð til Skúvoyar, har til gingu niðan á eggina og sóu bjørgini. Tey vitjaðu á flakavirkinum og á lívfiskastøðini. Leygardagin vóru tey ein sjóverkstúr við Norðlýsinum kring Nólsoynna og inn á Skálafjørðin. Síðan fóru tey til Norðagøtu at skoða gamla byggilist og aftur til Havnar. Sunnudagin vóru børnini heima hjá foreldrum og vertsforeldrum og um kvøldið var skipað fyri einum rimmar diskotekið í býlingshúsunum millum Gilja. DJ Rúni legði plátur á og Brandur Enni vitjaði og skrivaði autografar.

Í dag er sjeyndi flokkur úr Søllingi á veg niður aftur til Danmarkar, og gerandisdagurin byrjar aftur hjá sjeynda flokki í Hoyvíkar Skúla.






Tú ert millum 13 og 25 ár. Alt annað er líkamikið. Dámar tær 1nú romantiskar tónar, tá ið tit eru 2eini? Ert tú tann seigi, sum einsamallur 3vur í Ormin Langa, ella hin bragdliga, sum altíð skalt 4 nakrar flatar? Setur tú hvørt 5oyra inn á kontu ella keypir tú heldur 6tanda parið av diesel-buksum? Nýforelskaður og í 7. himni, ella bert tú als ikki 8 fyri at vera single? Eisini líkamikið! Fá tær bara eitt av spildur9 +kortunum frá Føroya Sparikassa. Tú kanst velja millum 10! Við egnum nick-navni, sjálvandi ;)

Bílegg títt +kort í Føroya Sparikassa. Eisini um tú hevur eitt frammanundan. Hav eina passmynd av tær sjálvum við. Tú fært nýggju stakfløguna hjá Brandi Enni beinanvegin – ókeypis!

**Plusspakkin:** Í plusspakkanum eru tvær kontur og eitt +kort. Fyrra kontan, +Spar, er bundna sparikontan. Seinna kontan er +Kontan. Hon er brúkskonta við tínum serstaka +korti.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo